| Februar 1994 dagur | | SÓLIN upp | í suðri | niður | Longd á degnum | Munur vetur | summar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24 | Hós Tórshavn | 7.48 | 12.40 | 17.33 | 9.45 | + 4.44 | ÷ 9.52 |
| 25 | Frí | 7.45 | 12.40 | 17.36 | 9.51 | + 4.50 | ÷ 9.46 |
| 24 | Hós Mykines | 7.52 | 12.44 | 17.37 | 9.44 | + 4.45 | ÷ 9.55 |
| 25 | Frí | 7.49 | 12.44 | 17.40 | 9.50 | + 4.51 | ÷ 9.49 |
| 24 | Hós Sumba | 7.46 | 12.40 | 17.35 | 9.48 | + 4.33 | ÷ 9.31 |
| 25 | Frí | 7.43 | 12.40 | 17.38 | 9.54 | + 4.38 | ÷ 9.25 |
| 24 | Hós Viðareiði | 7.49 | 12.39 | 17.31 | 9.43 | + 4.51 | ÷10.05 |
| 25 | Frí | 7.45 | 12.39 | 17.34 | 9.49 | + 4.57 | ÷ 9.59 |


# Dimmalætting

NR. 23 • Hósdagur 24. februar 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212


| Februar 1994 dagur | | MÁNIN upp | í suðri | niður |
|---|---|---|---|---|
| 24 | Hós Tórshavn | 16.00 | 23.38 | 6.38 |
| 25 | Frí | 17.35 | | 6.52 |
| 24 | Hós Mykines | 16.03 | 23.42 | 6.42 |
| 25 | Frí | 17.39 | | 6.56 |
| 24 | Hós Sumba | 16.02 | 23.38 | 6.36 |
| 25 | Frí | 17.36 | | 6.51 |
| 24 | Hós Viðareiði | 15.57 | 23.37 | 6.39 |
| 25 | Frí | 17.33 | | 6.52 |

## Aktuella hornið




# 10 umsóknir til seismisku kanningarnar

Um tríggjar vikur fæst at vita, hvørji oljufeløg fáa loyvi at gera seismisku kanningarnar á føroyska landgrunninum.

BEATE L. JENSEN

10 útlendsk feløg hava sent Oljufyristingini á Debesartrøð umsóknir í sambandi við loyvi at gera forkanningar á føroyska landgrunninum eftir kolvetni, ið fevnir um ráevni av ymsum slag, olju og gassi.

Áhugaðu feløgini høvdu bert einar fjúrtan dagar at gera vart við seg fyri at vera við í kappingini um at sleppa framat at gera seismiskar kanningar um okkara leiðir.

Fyri at fáa tilfar frá føroysku myndugleikunum í sambandi við arbeiði, ið gerast skal, skuldu áhugaðu oljufeløgini gjalda 30.000 kr. hvørt. Um vit hava fingið hesa upphædd frá hvørjum einstøkum umsøkjara er Marita Petersen løgmaður ikki heilt greið yvir, tí tað kann vera at nakrir umsøkjarar hava verið felags um at útvega sær tilfarið.

### Byrja í vár

Annars er tað Oljufyrisitingin, ið tekur sær av umsóknunum, og tað, sum hon ger í løtuni, áðrenn loyvini vera givin, er at viðgera hvønn einstakan umsøkjara sær.

Væntandi verður hetta fyrireikingararbeiðið ikki liðugt fyrr enn um einar tríggjar vikur.

Umsóknarfreistin at søkja um loyvi til kanningarnar var longu úti 21. februar, tí landsstýrið vil hava at skjótt skal berast at. Ikki minst ræður um at fáa eina avgerð loyvunum viðvíkjandi so tíðliga í vár sum gjørligt, fyri at oljufeløgini kunnu leggja sítt arbeiði til rættis fyri árið longu nú.

Landsstýrið avgjørdi herfyri, at tvey loyvi skulu gevast til seismisku kanningarnar.

## Veðrið

**Eitt lágtrýstumráði vestan fyri Bretland ferðast spakuliga eystureftir, meðan eitt hátrýst yvir landnyrðingspartinum av Grønlandi komandi dagarnar breiðir seg eystur- og suðuryvir. Kølin luft við kavaælingi streymar næstu dagarnar inn yvir Føroyar av norði og landnyrðingi. Brúgvaløg nærkast væntandi Føroyum av suðri, men raka helst ikki Føroyar kortini.**




**Í dag:**

**Gul til strúk í vindi av norði og landnyrðingi, 8 til 13 m/s. Hálvskýggjað og ælaveður við kava ella heglingi. Tað verður nakað kaldari, millum 1 og 4 kuldastig.**




**Í morgin:**

**Strúkur í vindi av norði og landnyrðingi, umleið 13 m/s, men seinnapartin snarar hann í ein eystan og veksur vindin til millum 13 og 18 m/s. Tað verður kavaælingur, men hann klárar kortini í av og á. Hitin fer at liggja um frostmarkið.**

**Leygardagin:**

**Hvassur vindur til skrið av eystri og landnyrðingi, 15 til 20 m/s, og okkurt kavaælið. Einstakir sólglottar verða kortini. Hitin fer at liggja um frostmarkið alt samdøgrið.**

**Sunnudagin og mánadagin:**

**Hvassur vindur til skrið av eystri, 15 til 20 m/s, sum verður nakað lakari seinni, 10 til 15 m/s. Tað verður skýggjað fyrrapartin, og kavaælingur ella kavaslettingur. Annars verður fyri tað mesta turt. Hitin fer at liggja millum 1 og 4 stig.**




Fráboðanir um gudstænastur o.a., sum ynskjast undir Innanoyggja-teigin, skulu vera blaðnum skrivliga í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri, blaðið kemur út. Merkið brævbjálvan Tíðindi Innanoyggja og sendið hann í góðari tíð til Dimmalætting, Box 19, FR-110 Tórshavn. Í brævinum má týðuliga tilskilast, hvønn dag fráboðanin skal í blaðið.

**Gudstænastur** 2. sunnudag í føstu. Havnar kirkja P. M. Rasmussen; Nólsoy, altargangur, S. Klein; Vesturkirkjan, altargangur, H. J. Joensen; Argir kl. 11, Kirkjusalurin á Landssjúkrahúsinum kl. 17, altargangur, K. Mørkøre; Kvívík kl. 12, altargangur (skriftarmál kl. 11.50) M. Bæk, kl. 17 J. Kass; Kollafjørður kl. 12 M. R. Jacobsen; Miðvágur kl. 12 D. Johannesen; Sandavágur kl. 12 U. Næs; Eiði kl. 12, altargangur (skriftarmál kl. 11.40) E. Olsen; Rituvík kl. 11, Nes kl. 15 deyvagudstænasta, talvan gongur fyri deyvameinigheitina J. Bech; Hellurnar, altargangur, P. O. K. Olofson; Fuglafjørður kl. 12, altargangur, O. W. Jakobsen, talvan gongur fyri DEM; Oyndarfjørður kl. 12 J. Fríðriksson; Klaksvík kl. 11 P. Paulsen; Kunoy kl. 12, altargangur, H. Bøgesvang; Hattarvík kl. 12 E. Beder; Sandvík kl. 12, Øravík kl. 18 M. Kjærbo; Skúvoy kl. 12, altargangur, J. R. Hansen; Vágur kl. 11 (skótarnir møta) H. Joensen, talvan gongur fyri Skótahjálpina.

**Føstugudstænastur** hósdagin. Argir kl. 20 H. Bøgesvang, talvan gongur fyri Guds orðs boðan; Miðvágur kl. 20 J. Fríðriksson; Sjóvar kirkja kl. 20 U. Næs; Rituvík kl. 20 J. Bech; Klaksvík kl. 20 P. M. Rasmussen; Húsavík kl. 19.30 E. Olsen; Tvøroyri kl. 20 M. Kjærbo.

### Suðurstreymoy

**AA-fundur** í Havn er fríggjadag kl. 20 í Tórsgøtu 5 og kl. 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu.

**Adventkirkjan** við Hoyvíksvegin. Leygardagin kl. 10 bíbliugransking v. Kristinn Johnsson. Barnabíbliutími. Kl. 11 gudstænasta v. J. V. Danielsen.

**Aglow,** Tórshavn. Møti verður í kantinuni á Læraraskúlanum leygardagin kl. 20. Allar kvinnur kunnu vera við.

**Al-Anon.** Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn hósdag kl. 21 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanyri).

**Aqua Vitae,** Bøkjarabrekka 9. Í dag kl. 21-01 bønartænasta á tlf. 10109. Telefonandaktin 11986. Opið hús er hósdag kl. 15-18.

**Barna- og Ungdómstelefonin** hjá Barnabata/Reyða Krossi svarar mánadag kl. 16-18 á tlf. 10645.

**Blákrossheimið,** viðgerðarstovnur, tlf. 15575, svarar alt samdøgrið. Fólk við rúsevnistrupulleikum kunnu koma inn kl. 13-20.

**Evangeliihúsið**, Tróndargøta. Í dag kl. 16 eldrahugni. Fríggjadagin kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin møti kl. 11 og kl. 18. Telefonandaktin 12266, barnatelefonandaktin 19934.

**Felagsskrivstovan** hjá Fráhaldsrørsluni, Heygskrókur 16, Tórshavn, tlf. 16424, hevur opið hvønn týsdag frá kl. 12-18 og hósdag frá kl. 9-13. Eisini er opið aðrar dagar í vikuni.

**Filadelfia,** Landavegur. Í morgin kl. 21 savnast ungdómurin á Fugloyarvegi 9. Leygardagin kl. 17-18 bøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 11.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 evang. møti.

**KFUM og KFUK,** Havn. Opið hús í KFUM í morgin frá kl. 19-24. Arbeiðsdagur í KFUM leygardagin kl. 14.

**Lívdin,** Dj. í Geilsgøta 1, Tórshavn. Fríggjadag og leygardag er opið kl. 19-01, sunnudag kl. 19-23 og mikudag kl. 20-23.

**Losjan** í Havn. Í morgin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Meinigheitshúsið** í Havn. Ytrimissiónsvika. Í dag kl. 19 bønarmøti, kl. 20 Ung í Ytrimissión v. Jørmund Foldbo og Bergur D. Joensen, systrarnar av Toftum luttaka, kl. 21.40 DMS í Føroyum v. J. R. Hansen, ljósmyndir og frágreiðing. Í morgin kl. 17 bíbliutími v. Ole W. Jakobsen, kl. 19.30 bønarmøti, kl. 20 Kall til ytrimissión v. Elsu Jacobsen, kórið av Glyvrum luttekur.

**Rhema,** Argir. Húsmøti verður í dag kl. 20 í Bringstúni 4 á Argjum. Fríggjadagin kl. 23 verður bønarnátt.

**Ráðgevingin í Kvinnuhúsinum** er opin hvønn hósdag frá kl. 19-21, inngongd hjá KFUM, undir Pisuvarða 2, ella á tlf. 17200.

### Norðstreymoy

**Nardus.** Telefonandaktin er at hoyra á tlf. 21360.

**Saron,** Vestmanna. Í dag kl. 19 frítíðararbeiði. Í morgin kl. 21 bønarmøti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 evang. møti. Mánadagin kl. 17 guitarundirvísing v. Jónar, kl. 19.30 kvinnumissión hjá Kristu.

**Vitjunartænastan** hjá Reyða Krossi og Landsfelag Pensionistanna er flutt til Johannu Johannesen, tlf. 24205, Vestmanna, sum gevur navn og tlf. hjá nærmasta álitisfólki.

### Vágar

**AA-fundir** verða hildnir í bygdarhúsinum í Miðvági sunnudagin kl. 17, týsdagin kl. 18.45 og fríggjadagin kl. 18.45.

**Aglow,** Vágar. Møti verður í Róðrarneystinum í Sørvági leygardagin kl. 20.

**Filadelfia,** Vágar. Sunnudagin kl. 16 evang. møti.

**Meinigheitshúsið,** Sandavági. Í dag kl. 20 kvinnumøti hjá Honnu Petersen. Allar kvinnur kunnu vera við.

**Missiónshúsið,** Sørvági. DMS fundur verður hósdagin kl. 20. Allar kvinnur kunnu vera við.

### Eysturoy

**Bahá'í,** Toftir. Óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í fríggjadagin kl. 20 heima hjá Sue og Roy Philbrow, "Ridvan", Undir Nesinum, Toftir.

**Forbønartænastan Shalom** í Kelduni í Skálafirði, tlf. 41677 hvønn fríggjadag kl. 21-24.

**Karmel,** Eiði. Missiónsvikan heldur fram í dag kl. 20, har Torleif Johannesen, sjóm. trúb. talar, og Jóhanna og Hallgerð syngja. Innsavnan. Fríggjadagin kl. 20 talar Sylverius Jacobsen og Skála Streingjakór syngur.

**KFS.** Yngra KFS lega verður í Tofta skúla 25.-27. febr. Sí lýsing inni í blaðnum.

**Missiónshúsið,** Leirvík. Eldrahugni í dag kl. 16-18.

**Thabor,** Toftir. Ungdómsmøti verður leygardagin kl. 20.

**Ungdóms- og Missiónshúsið** á Glyvrum. Fríggjadag kl. 19 er juniormøti.

### Norðoyggjar

**Aglow,** Klaksvík. Fundur verður í matstovuni á Soli Deo Gloria leygardagin kl. 20. Allar kvinnur kunnu vera við.

**Hvannasunds skúli.** Í morgin kl. 20.30 eitt annaðleiðis kvøld v. Ásvald og Debes Andru.

### Sandoy

**Betania,** Skopun. Ungdómsbólkurin kemur saman í dag kl. 19. Tlf. andaktin 61707.

**Dalur.** Missiónsvikan byrjar í skúlanum í dag kl. 20 v. Dorius Johannesen og Sjúrði Nolsøe. Í morgin kl. 20 talar Jákup R. Hansen og Rólant Vidtfeldt.

**Missiónshúsið,** Skopun. Í dag kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.

### Suðuroy

**KFUK,** Vágur, hevur møti í morgin kl. 19.30 í Meinigheitshúsinum.

**Konfirmatiónin** á Tvøroyri verður pálmasunnudag kl. 11.

**Missiónshúsið,** Hovi. Møti sunnudagin kl. 18 v. Hj. Poulsen, trúb. Innsavnan.

**Missiónshúsið,** Porkeri. Á møtinum sunnudagin kl. 20 luttaka Karl og Elita Kenning.

**Missiónshúsið,** Tvøroyri. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

**Parkinsonfelagið** hevur viðtalu v/ Ebbu Petersen, Famjin, tlf. 71352.

### Uttanlands

**Eliaskirkjan,** Vesterbrogade 49, København. Møti verður í kjallaranum í Eliaskirkjuni leygardagin kl. 19. Bussarnir 1, 6, 16, 28 og 41 steðga nærhendis. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli í tónleikarúminum á Oyrasundskollegiinum. Tlf. 032 88 67 27.

**Frá Útvarpinum.** Tey føroysku tíðindini verða nú send í danska útvarpinum leygardag kl. 19 á millumbylgju 1062 KHz.

**Føroya Banka Tíðindi** kunnu takast niður frá Lyngby Radio via telex hesar tíðir: Leygardag kl. 1630 GMT, sunnudag kl. 0030 GMT og kl. 0830 GMT.

**Kristnastova,** Birmavej 36, København S (Amager). Fríggjadag kl. 20 er kristilig samkoma. Sunnumorgun kl. 10.30 er samkomufundur við breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli. Tlf. (031) 55 18 09

**"Malta",** Vinkelvej 2, Hirtshals. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 19 evang. møti. Tlf. (098) 94 43 70.

**Vitin,** Århus. Februarsamling verður leygardagin 26. februar kl. 13.30-17.00 í felagshúsinum »Stenhytten«, Stenaldervej 77, Brabrand. Byrjað og endað verður við onkrum til matna. Øll verða boðin. Takið børnini við.

### Merkisdagar

**Gullbrúdleyp.** Leygardagin 26. febr. kunnu hjúnini Elisabeth og Jacob Jensen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin kl. 19. Adressan er Smyrilsvegur 7, á loftinum í Skemmuni.

**Silvurbrúdleyp.** Týsdagin høvdu hjúnini Jónhild og Jákup Mohr,Saltangará, silvurbrúdleyp. Tey vóru burturstødd.

**Brúdleyp.** Fríggjadagin 25. februar giftast í Dómkirkjuni Armgarð Reginsdóttir Olsen, Tórshavn, og Oyvindur Brimnes, Vestmanna. Br. adr.: Havnar Klubbi.

**75 ár.** Sunnudagin verður Anna Hansen, vanliga nevnd Anna á Tanganum, Sandur, 75 ár. Hon er burturstødd.

### Ymist

**Brævaskifti.** Tal Ben-Shlomo, 43 Yarden St., Ramat-Hasharon IL-47204, Ísrael, 16½ ára gamal, ynskir onkran at skriva saman við. Hann hevur stóran áhuga fyri smáu londunum her norðanfyri.

Roman Pluszka, 11-400 Ketrzyn, ul. Zeromskiego 4, Polen, ynskir onkran at býta um frímerkir við.

**Skipalistin.** Mercandian Senator fór úr Puerto Cabello 18. febr., síðani Buenos Aires, Montevideo og Santos. Mercandian Prince II kom til Vera Cruz 24. febr., síðani Altamira, Puerto Cabello og Paramaribo. Mercandian Queen II kom til Port Said 23. febr., síðani Jeddah. Mercandian Gigant (Seaboard Gigant) kom til Puerto Cortes 22. febr., síðani Miami, La Guaira, Puerto Cabello og Maracaibo. Mercandian Globe (Seaboard America) kom til Puerto Cortes 23. febr., síðani Santo Tomas de Castilla, Miami, Puerto Cortes, Santo Tomas de Castilla og Miami. Mercandian Ocean (Seaboard Ocean) kom til Las Minas 24. febr., síðani Puerto Limon, Miami og Las Minas. Mercandian Continent kom til Everglades 24. febr., síðani Santo Tomas de Castilla, Puerto Cortes, Port Everglades og Santo Tomas de Castilla. Mercandian Arrow kom til Jacksonville 23. febr., síðani Miami, Puerto Cabello, Curacao, Aruba, La Guaira og Jacksonville. Mercandian Universe (Seaboard Universe) kom til Miami 23. febr., síðani Puerto Cortes, Santo Tomas de Castilla, Miami, Puerto Cortes og Santo Tomas de Castilla. Mercandian Sun II (Seaboard Sun) kom til La Guaira 23. febr., síðani Puerto Cabello, Maracaibo, Puerto Cortes, Miami og La Guaira. Mercanidan Sea II (Seaboard Caribe) kom til Miami 24. febr., síðani Las Minas, Puerto Limon, Miami og Las Minas. Mercandian Pacific II (NDS Atlantic) kom til Douala 24. febr., síðani Rottedam og Antwerpen. Mercandian Nautic (Mount Cameroon) Lissabon 24. febr., síðani Luanda og Lobito.

## Ferd'nand

